# *Bygdaráðið*

**Almenni Bygdaráðsfundurin 03.09.2007**

**Mál nr. 67/2007 Mentunarmál.**

Í skrivi dagfest 03.07.2007 greiðir Vilmund Jacobsen frá, at hann síðani 25.10.2006 hevur haft eina grein í vikuskiftissosialinum, sum hann nevnir "Umborð" og sum hann nú ætlar skal koma út í bók. Bókin kemur at umfata sjólívið v.m. hjá 50 siglandi monnum. og biður hann um fíggjarligan stuðul til bókaútgávuna.

Mentanarnevndin mælir til at stuðla útgávuni við at keypa bøkur fyri kr. 3.000,00.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini og taka peningin av konto nr. 493640, "Stuðul ymisk endamál".

**Avgerð:** Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 68/2007 Mentamál.**

Í skrivi dagfest 3. juli 2007 greiður Justinus L. Eidesgaard, Hellurnar, frá, at hann ætlar at geva eitt blað út um Esyturoynna, og søkir um fíggjarligan stuðul uppá 35.000,00 kr. sum er ein grundarsteinur fyri, at útgávan kann gerast verðuleiki.

Mentanarnevndin mælir frá at stuðla, mett verður, at upphæddin er ov stór í mun til játtanina til slík endamál.

Fíggjarnevndin mælir til, at Nes kommuna játtar pening, og verður við at stuðla útgávuna av blaðnum, tí hetta verður ein góð marknaðarføring av sjálvari kommununi, útstykkingar, havna- og vinnuøkir v.m., við tað at blaðið kemur í hvørt heim í landinum. Peningurin verður tikin av kto. nr. 690955 "Projektleiðsa v.m."

**Avgerð:** Tilmælið frá Fíggjarnevndini fekk 4 atkvøður fyri (Símin Johannesen, Súni í Hjøllum, Petur í Túni og Helen H. Jacobsen) og 3 ímóti (Elin á Torkildsheyggi, Petur J. Petersen og Eyðfinn Johannesen) og er sostatt samtykt.

**Mál nr. 69/2007 Skúlamál.**
Hin 01.06.2007 kom skriv, viðv Sáttmálanum sum fór úr gildi við árslok 2006, frá tannlæknunum í Sandavági, Fuglafirði, Leirvík og Saltangará.

Teir eru samdir um at verandi sáttmáli hevur roynst væl og mæla teir tí til at hann heldur áfram tó við niðanfyri standandi broytingum.

1. Í §1 verður innsett sum
   stk 4: Børn við somu brekum sum tey, sum tey í Danmark koma undir Regionsplejen, eru ikki umfata av hesi avtalu.
2. Í §2 verður innsett sum
   Stk. 5: Fellur tannlæknin frá og gevst við sínum virksemi, tekur avvarandi kommuna ábyrgdina av skipanini.
3. Partarnir gera eina avtalu um, hvussu prístalsreguleringin verður gjørd í sáttmálaskeiðnum.

4. Árligur eindarprísur. Lønarvøksturin fyri starvsbólkarnar í tannrøktini hevur verið soleiðis síðan 1. jan 2002:
   a. Klinikchefar 29% (1/4-2001-1/10-2006)
   b. Tannrøktarar 25% (1/4-2001-1/10-2006)

Skal eindarprísurin fylgja hesum vøkstri, eigur hann at verða millum

- 375,00 kr. og 2.451,00 kr. fyri hvørt barn/ár

Tannlæknarnir ynskja at fáa ein felagsfund við avvarandi kommunur, soleiðis at nýggja avtalan er klár at seta í gildi 1. oktober 2007.

Nýggjur sáttmáli millum kommunurnar og skúlatannlæknarnar er gjørdur og er viðgjørdur saman við reglugerðini av Føroya kommunufelag og KSF. At koma í gildið 1. januar 2008.

Mentanarnevndin mælir til at taka undir við broytingunum.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini, og mælir til, at játtanin til Skúlatannlæknan hækkar upp í 2.400,00 kr. pr. barn og eftir núverandi barnatalið verður hækkingin uml. 237.000,00, (úr 723.000,00 kr. upp í uml. 960.000,00) og at neyðugur peningurin vera avsettur á komandi fíggjarætlan kto. nr. 553100 ”Skúlatannlæknin”.

**Avgerð:** Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 70/2007 Stuðulsmál.**

Í umsókn dagfest 02.07.2007 biður svimjufelagið FLOT um fíggjarligan stuðul í samband við, at felagið sendir 18 svimjarar til Køge Open 25.10.2007.
Felagið sendir sínar bestu svimjara avstað, so hesir kunnu mennast.

Mentanarnevndin mælir til at játta 2.000 kr. til ferðina.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini at
stuðla FLOT, men at stuðulin verður 5.000,00 kr. og mælir til, at taka
peningin av konto nr. 493640, "Stuðul ymisk endamál".

**Avgerð:** Tilmælið frá Fíggjarnevndini var samtykt við 4 atkvøðum fyri (Símin Johannesen, Súni í Hjøllum, Petur í Túni og Helen H. Jacobsen, ongin ímóti og 3 (Elin á Torkildsheyggi, Petur J. Petersen og Eyðfinn Johannesen) blankar.

**Mál nr. 71/2007 Skúlamál.**

Nes kommuna hevur søkt eftir nýggjum skúlavøri í bløðunum
29.06.07 og 02.07.07, har umsóknarfreistin var sett til 20. juli 20078
kl. 16,00. Tá freistin var úti, vóru 12 umsøknir komnar til starvi

**Avgerð:** Bygdaráðið hevur á fundi 20.08.2007 einmælt samtykt, at seta
Borgar Hansen Gaddavegur 36, Nes í starv sum húsavørð við Tofta skúla, at byrja 01. oktober 2007

**Mál nr. 72/2007 Umhvørvismál.**

Bygdaráðið hevur samtykt, at Nes kommuna skal verða partur av
norðurlendska samarbeiðinum um "biologisk mangfoldighed", sum er
eitt samstarv, sum Agenda 21 stovan stendur fyri, og sum er eitt
samstarv millum kommunur í norðanlondum.
Kommunurnar eru:
Ørebro í Svøríki
Kolding, Holsterbro og Herning í Danmark.
Borgå í Finlandi
Akureyri og Alftanes í Íslandi.
Trondheim og Stjørdal í Norra
Og so Nes kommuna úr Føroyum, har vit hava gjørt eitt projekt, har
Runavíkar kommuna eisini er við, og sum hevur fyngið heiti:
"Toftavatn – náttúra, uppliving og trivnaður".

**Mál nr. 73/2007 Umhvørvismál**

Hin 01.06.2007 kom umsókn, um stuðul á kr. 500,00, frá Nevndini í
Føroya Fuglafrøðifelag.

Felagið arbeiðir fyri fuglalívinum í Føroyum millum a.a

- Felagið hevur skipað fyri tiltøkum, sum kunnu menna um áhugan fyri fugli. Eitt nú gongutúrum og við at útvega frágreiðingina. Eisini skipar felagið fyri kunnandi fyrilestrum.
- Felagið ger vart við seg, tá mett verður, at fuglalívið er fyri vanbýti.

Mentanarnevndin mælir til at játta Fuglafrøðifelagnum kr. 500,00 í stuðli.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini

**Avgerð:** Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 74/2007 Mentanarmál</u>**

Hin 01.06.2007 kom fíggjarætlan fyri 2008 frá Bókasavninum í Nes kommunu og Skúlabókasavninum til ummælis.

Mentanarnevndin mælir til at góðtaka fíggjarætlanina

Fíggjarnnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini og at peningurin kr. 100.000,00 (STB 30.000,00 kr. og BNK 70.000,00 kr.) verður sett á fíggjarætlanina fyri 2008 á ávíkavist kto. nr. 430100 og 450100.

**Avgerð:** Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 75/2007 Mentanarmál</u>**

Neyðugt er at søkja eftir lívbjargara til svimjuhøllina.

Mentanarnevndin mælir til at søkja eftir fólki skjótast gjørligt.

**Avgerð:**Tilmælið frá Mentanarnevndini samtykt.

**<u>Mál nr. 76/2007 Mentamál</u>**

B68 søkir um stuðul til tiltøkini sum vóru á B68 degnum 18.08.2007.

Mentanarnevndin mælir frá at játta stuðul til hetta tiltakið hjá felagnum.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð:**Tilmælini samtykt.

## Mál nr. 77/2007 Jarðarmál

Í vár og summar hevur verið neyðugt at pumpa vatn úr Toftavatni, men tað hevur víst seg, at vatni í Kornvatni er minka kortini, t.v.s. vit hava ikki klára vatnnýtsluna og tí er kannað hvat skal til, fyri at vit kunnu økja um pumpukapasitetin.
Vit hava sum er 3 pumpur yvir við Toftavatn, men el-kaðalin frá reinsuverkinum og yvir, er ikki førður fyri at dríva meir enn 2 pumpur, og tí er kannað hvat ein sverari el-kaðal, sum er førur fyri at dríva 3 pumpur ella meir, kostar.
Longdin er 2,1 km. og ein 150 m/m kápil, sum er førur fyri at dríva 3 pumpur. Kostnaður fyri tilfarið liggur um 200.000,00 kr. og so kemur gravingin afturat.

Tekniska nevnd mælir til, at kommunan gravar fyri og leggur kaðalin frá reinsuverkinum og oman til pumpuhúsið, og at peningur verður avsettur á fíggjarætlanini fyri 2008, við eini upphædd uppá 300.000,00 og biða um tilboð uppá graving og tilfar.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og mælir til, at avsettar vera 300.000,00 kr. á fíggjarætlanina fyri 2008 á kto. nr. 210200 "Umvælingar av vatnleiðingum v.m."

**Avgerð: Tilmælini einmælt samtykt.**

## Mál nr. 78/2008 Jarðarmál.

Hin 22.06.2007 søkir Heidi Mohr Poulsen, Dr. Jacobsensgøta 8b, Tórshavn, um grundstykki merkt J samb. yvirlitstekning frá Teknisku deild, fram við Nesveg, t.v.s. úti í Forna.

Tekniska nevnd mælir til at Heidi Mohr Poulsen, fær loyvi til at ogna sær umbidna grundstykkið.

**Avgerð:** Tilmælið einmælt samtykt.

## Mál nr. 79/2008 Jarðarmál.

Hin 12.07.2007 søkir Hjalgrím Joensen, Lýðarsvegur 17, Toftir, um at fáa grundstykki nr. 39 í útstykkingini á Lýðarsvegi

Tekniska nevnd mælir til, at Hjalgrím Joensen fær grundstykki til sethús, men at hann kemur á tann felags bíðilistan, sum kommunan hevur fyri umsøkjarar av grundstykkjum.
Skipanin er tann, at ein og hvør umsøkjari kemur á felags bíðilista fyri grundstykkir í kommununi, sum er skipaður eftir dagfesting, og taka tey ikki av tilboðnum tá grundstykkir vera boðin út, rykkja tey ikki aftur um, men fáa møguleikan næstu ferð.

**Avgerð:**Tilmælið frá Teknisku nevnd var samtykt.

**Mál nr. 80/2007 Jarðarmál.**

Í umsókn dagfest 22.01.2007 søkir Karl Magni Hammer um eitt grundstykki í útstykkingin á Gaddavegnum.

Tekniska nevnd mælir til, at Karl Magni Hammer fær grundstykki til sethús, men at hann kemur á tann felags bíðilistan, sum kommunan hevur fyri umsøkjarar av grundstykkjum.
Skipanin er tann, at ein og hvør umsøkjari kemur á felags bíðilista fyri grundstykkir í kommununi, sum er skipaður eftir dagfesting, og taka tey ikki av tilboðnum tá grundstykkir vera boðin út, rykkja tey ikki aftur um, men fáa møguleikan næstu ferð.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd samtykt.

**Mál nr. 81/2007 Jarðarmál.**

Í umsókn dagfest 18.07.2007 søkir Jógvan P. Hansen, Rókavegur 7, Saltnes, um at fáa grundstykki norðanfyri matr. nr. 699ba, á Gaddavegnum.
Hetta grundstykki er í framhaldinum av Gaddavegnum og er omanfyri vegin. Bygdaráðið hevur samtykt, at tekna eitt framhald uppá 400 metur av Gaddavegnum, sum hetta grundstykkið er ein partur av.

Tekniska nevnd mælir til, at Jógvan Páll Hansen fær grundstykki til sethús, men at hann kemur á tann felags bíðilistan, sum kommunan hevur fyri umsøkjarar av grundstykkjum.
Skipanin er tann, at ein og hvør umsøkjari kemur á felags bíðilista fyri grundstykkir í kommununi, sum er skipaður eftir dagfesting, og taka tey ikki av tilboðnum tá grundstykkir vera boðin út, rykkja tey ikki aftur um, men fáa møguleika næstu ferð.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd samtykt

**Mál nr. 82/2007 Havnamál.**

Á fundi við kommununa hin 18.07.2007, søkir M.J.Saltsølan, Tórshavn, um byggiloyvi til ein saltsølubygning, sum er 40x40 metrar.
Bygningurin verður í tveimum, hvør uppá 20 metra breidd, so útvendiga kemur hetta at síggja út sum tveir bygningar. Bygningurin sum verður brúktur til saltgoymsluna, er allur betong við betongtakið, meðan hin bygningurin verður sum ein vanlig høll, til lagur, avskiping, skrivstovur v.m.
Hæddin á bygninginum verður 8,5 metrar upp til mønina.
Magni Johannesen upplýsti, at leigan á verandi saltsølu í Havn, gongur fram til okt. 2009, so tíðarskeiðið til bygninguri skal vera liðugur er 2 ár, og tað tekur einar 6 mdr. at byggja saltsøluna.
Teir umseta umleið 17.000 tons av salti um árið og kemur alt salti til landi við skipum og tí má gerðast atløgusíða framman fyri bygningin, og framgongur móttøkuskipanin av saltinum á viðløgdu tekningum.

Tekniska nevnd mælir til at játta M.J. Saltsøluni prinsipielt byggiloyvi sambært innsendu umsókn á havnaøkinum við Rætt.

**Avgerð.** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 83/2007 Havnamál.**

Hin 25.07.2007 søkir Sperrcon SP/f um byggiloyvi til eina byggihøll til sperrir, inni á Rætt.
Høllin er 20 x 40 metrar við einum umsitingartilbygningi sum er 4,20 m breiður og 21,20 langur, meðan hæddin er uml. 11 metur.

Tekniska nevnd mælir til at játta SP/F Sperrcon prinsipielt byggiloyvi sambært innsendu umsókn á havnaøkinum við Oyrarnar.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 84/2007 Byggimál.**

Hin 08.06.2007 søkja Dagmar og Jan Gaardbo, Toftir, um byggiloyvi til bilhús og dur eystan fyri sethús teirra á matr. nr. 387.
Bilhúsið, sum verður bygt eystanfyri sethúsini kemur at vera uml. 1 metur frá grótlaðingini móti Høganesvegnum. Bilhúsið kemur 4,34 m norður um húsini og verður 8 metur langt og 6 metur breitt í alt 48 fermetrar, meðan durðurin verður uml. 2 m breiður og 4,76 langur. Tey røttu málini eru á tekningini.
Eisini søkja Dagmar og Jan Gaardbo um loyvi til at byggja út yvir altanuna á vestursíðuni á sethúsunum.
Viðløgd er tekning av øllum síðum av húsunum tá byggingin er gjørd og plantekning av bilhúsinum, durðinum og altanini.

Tekniska nevnd mælir til at játta Jan Gaardbo byggiloyvi til bilhús og dur sambært innsendu tekning, sum verður undir veghædd eystan fyri sethúsini, eftir vanligum treytum, og loyvi til at byggja út yvir altanuna á vestursíðuna.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 85/2007 Jarðarmál.**

Nes kommuna sendi skriv til Theodor Poulsen og Janus Jensen hin 13.07.2007 viðv. grundstykkjunum fram við Høganesvegnum, og bað um svar áðrenn 20.07.2007.
Í skrivi dagfest 20.07.2007 boðar Theodor Poulsen frá, at svar teirra er noktandi at selja til kommununa.
Theodor vísur á, at vanlig mannagongd er nógvarstaðir, at ein familja setur seg niður á trøðni hjá teimum og hava teir somu áskoðan. Um kommunan eftirfylgjandi við ognartaka jørðina, koma teir at seta krøv til bróðurpartin av grundstykkjunum.

Tekniska nevnd mælir til, at svara Theodor Poulsen og Janus Jensen, at kommunan er sinnað at lata tey fáa 2 grundstykkir, sum dømir eru um, hevur verið gjørt av kommununi í øðrum førum, annars verður økið ognartikið.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var samtykt við 6 atkvøðum fyri og einari ímóti (Helen H. Jacobsen).

**Mál. nr. 86/2007 Byggimál.**

Í umsókn dagfest 07.08.2007 søkir Fiskamarknaður Føroya um byggiloyvi til ein fiskauppboðsølubygning á havnaøkinum, beint norðarfyri bygningin sum landingarmiðstøðin ætlar at byggja norðanfyri Strandferðslubygningin.
Verandi leigusáttmáli millum Landingarmiðstøðina og Fiskamarknaðin gongur út við árslok 2008.
Bygningurin verður gjørdur í trimum hæddum og er 16,4 metur breiður og kemur at líkjast Strandferðslubygningin vestureftir. Bygningurin verður einans 10,4 metur langur oman og niðan og blíva tí nøkur parkeringspláss omanfyri bygningin.
Tekning av bygninginum er viðløgd.

Tekniska nevnd mælir til, at fundur verður millum Fiskamarknað Føroya, Landingarmiðstøðina og kommununa, við tí endamálið at finna út av hvussu byggingin kann vera gjørd á havnalagnum til gagns fyri allar partar, áðrenn støða verður tikin til umsóknina.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 87/2007 Byggimál.**

Í umsókn søkir Petur Gaardbo, Undir Høganesi, um byggiloyvi til garð niðan móti vegnum, frá vendiplássinum og suður til omankoyringina. Garðurin verður í linju og annars sum tann hjá grannanum sunnanfyri, og verður ein betonggarður við rekverkið omaná, sum við innkoyringina verður undir 1,20 metur.
Nú omankoyringin er gjørd og benið upp á vegin kann vera vandamikið hjá børnum og øðrum at detta niður av, er neyðugt hjá teimum at gera garðin.

Tekniska nevnd mælir til at játta Petur Gaardbo byggiloyvi til garð niðan móti vegnum, har garðurin er í flugt við garðin sunnanfyri, við einum rekverkið omaná sum í mesta lagið verður 1,20 metur upp frá við útkoyringini.

**Avgerð:** Tilmælið samtykt.

**Mál nr. 88/2007 Byggimál**

Tilboð eru innkomin uppá útskiftan av øllum vindeygum í barnagarðinum:
Fa. Býli: kr. 127.625,00
H-Dygd: kr. 134.515,41

Tekniska nevnd mælir til at biða um tilboð uppá ísetan eisini frá báðum, til bygdaráðsfundin 3. sept.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og at peningurin verður tikin av kto. nr. 640200 ”Viðlíkahald Barnagarðurin”.

**Avgerð.** Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 89/2007 Trivnaðarmál.**

Í skrivi dagf. 29.juni 2007 frá Sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn biðja tey um stuðul til gjald til formannin og løn til ein bussførara.

Sum svarar til at hvør kommuna bert skal gjalda uml. 3,50 kr/íbúgva um árið í 3 ár.

Trivnaðarnevndin mælir til, at peningur verður settur av á komandi fíggjarætlan, og at málið verður viðgjørt í fíggjarnevndini.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini og mælir til at peningurin (3,50 kr. x 1240) kr. 4.340,00 vera avsettar á fíggjarætlanini fyri 2008.

**Avgerð:** Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

## Mál nr. 90/2007 Trivnaðarmál.

Barnagarðurin hevur fingið áheitan frá dagrøktini, um tey tvey børnini, sum eru eftir í dagrøktini, men hava aldur til barnagarðin, sleppa inn nú, so dagrøktin kann fáa øll børnini inn sum umsóknir eru um.
Leiðarin í Barnagarðinum hevur tosað við starvsfólkið um møguleikan at hava 55 børn inni í staðin fyri 52 børn sum normering er til, og meta tey at tað er forsvarligt, men so skulu tey hava løn hareftir.
Hetta viðførir, at ein meirijáttan uppá 8.400,00 kr. um mánaðin skal játtast.

Fíggjarnevndin mælir til, at játta Barnagarðinum 8.400,00 kr. pr. mdr. restina av árinum og síðani avseta pengar til hesi børn, í hvussu so er fram til summarsteðgin, á fíggjarætlanini fyri 2008 fyri at umgangast at børn eru á bíðilista.

**Avgerð: Tilmælið frá Fíggjarnevndini var samtykt.**

## Mál nr. 91/2007 Skúlamál.

Broytingarnar sum neyðugar eru at gera í verandi fýrrúminum eru viðgjørdar og gjøgnumgingnar, og út frá hesum hevur Óli Ludvig, vegna kommununa biðið Demich um at koma við einum tilboðið uppá hetta arbeiðið.

# *Bygdaráðið*

Demich er komið við einum tilboðið og er samlaður kostnaðurin fyri at taka niður og seta upp hitavekslarar og ketlar, skifta rør og fremja isolering v.m. í fýrrúminum kr. 87.782,00.

**Avgerð:** Bygdaráðið samtykti einmælt at taka av tilboðnum frá Demich, uppá 87.782,00 kr. Peningurin skal takast av kontoini ”Skúlabyggingin”.